Løgmaður verji hjá ítróttini

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, fekk mikudagin handaða gullnál Ítróttasambands Føroya

ÍTRÓTTUR
Tíðindaskriv

Tað er siðvenja, at løgmaður er verji hjá ítróttini. Ítróttasamband Føroya heitti herfyri á Jóannes Eidesgaard, løgmann, um at gerast verji hjá ítróttini.

Á lítlari samkomu í Tinganesi mikudagin takkaði Heðin Mortensen vegna Ítróttasamband Føroya løgmanni fyri, at hann vildi ganga umbønini á møti. Tað hevur stóran týdning fyri føroyska ítrótt her heima og í altjóða høpi, at Føroya Løgmaður er verji.

Ítróttasamband Føroya fegnast um, at Løgmaður vildi ganga umbønini á møti. Eingin ivi er í, at løgmaður við sínum royndum sum íðkandi m.a. úr Tvøroyrar Bóltfelag, skilir viðurskiftini hjá ítróttini og vil virka henni at frama.

MENNINGARLEIÐARI VIÐ VISJÓNUM

Vit sóknast eftir leiðara til nýggju menningardeild okkara.

Menningarleiðarin gerst partur av einari fyritøku við hugsjónum og málum innan prosess- og produktmenning.

Fyritøkan skal støðugt mennast, so Sparikassin eisini í framtíðini megnar at veita kundunum framúr góða fakliga og persónliga ráðgeving.

Fyri at røkka hesum málum krevst ein góður og sjálvstøðugur menningarleiðari við hóskandi útbúgving og royndum á KT- og fyrisitingarøkinum. Ynskiligt er at umsøkjarar hava royndir frá peningastovni, projekt- og leiðsluroyndir.

Uppgávurnar hjá menningarleiðaranum verða at hava dagligu leiðsluna og at skipa arbeiðið á KT- og fyrisitingarøkinum.

Menningardeildin mennir og røkir tøkniliga samskiftið, virkisgongdir og tænastur í tøttum samstarvi við stáps- og rakstrardeildir Sparikassans.

Menningarleiðarin hevur, við tilvísing til stjórnina, ábyrgdina av KT- og fyrisitingarpolitikki Sparikassans – herundir strategi, bygnaði, virkisgongdum og trygd innan økið.

Trivnaðurin og arbeiðsgleðin millum starvsfólkini hevur avgerandi týdning fyri Sparikassan, og á hesum økjum skal menningarleiðarin vera virkin.

Evnini at samstarva, samskifta og virka í einum umhvørvi, sum støðugt broytist, mugu vera góð. Vit ynskja okkum eina eldsál, ið eggjar øðrum til og torir at ganga á odda.

Umsøkjarin skal vera sinnaður at menna seg bæði fakliga og persónliga.

Starvið verður lønt sambært avtalu.

Áhugað eru vælkomin at venda sær til
Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðara,
tel 348510
marjun.eystberg@sparikassin.fo

ella til Marner Jacobsen, forstjóra,
tel 348571.

Umsóknir skulu verða Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mikudagin tann 7. apríl 2004. Tær skulu stílast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visjónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 172 fólk á 16 deildum kring um í landinum. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á menningardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 8 fólk.

FØROYA SPARIKASSI

REPROZ

Teitur við nýggjum bólki og nýggjari orku

Teitur var næstan ikki til at kenna aftur, tá hann mikukvøldið í mestsum nýggjum hami við nógv størri orku og sjálvsáliti fór á pallin frammanfyri 300 áhoyrarum

KONSERT
Rúnar Reistrup, Árhus

"Taitur i Voxhall den 24."

Hendan setning, við alternativa stavingarháttinum, sá eg herfyri av tilvildarligum ávum krutlaðan í kalendaran hjá einari ungari kvinnu í einum undirvísingarhøli á Universitetinum í Árhus.

Kendi hana ikki, men spurdi kortini, um hon ætlaði sær á konsert.

Ja, tað ætlaði hon sær. Hon hevði ongantið hoyrt tónleikin og visti millum null og einki um Teit. Men hon hevði hoyrt, at hann var skidego'.

Soleiðis endaði fonetiskt stavaða navnið hjá Teiti í kalendaranum hjá hesi kvinnuni, eins og tað man vera endað í mongum øðrum kalendara úr Europa til Amerika.

Frumskógartrummur

Søgan er eitt lítið, men ógvuliga, konkret dømi um, hvussu Teitur í seinnu árini seint, men støðugt, hevur bygt sær eitt navn upp í Danmark og aðrastaðni í heiminum. Ikki við reklamukampanjum, ikki við at skrædla sín tónleik niður í MTV-format, men við at lata framførslurnar tala, og frásagnirnar um góðu framførslurnar ferðast av munni til munn.

Soleiðis ber tað til, at Teitur, sum seinast hann var í Árhus spældi á lítlu alternativu Musikcafeini, hesaferð spældi fyri eini 300 fólkum á Voxhall, har kend nøvn eru gerandiskostur.

Longsul eftir el-guitara

Tá Teitur seinast var á konsertferð í Danmark, síðst í november mánaði, tyktist hann eitt sindur slitin og troyttur av at hava spælt hálvtannaðhundrað konsertin innanfyri fáar mánaðir.

Mikukvøldið var tað ein Teitur fullur av orku og sjálvsáliti, sum trein fram á pallin, eftir at danski bólkurin Hush hevði hitað honum áhoyrarafjøldina upp.

Fyrstu trý løgini framførdi Teitur einsamallur við kassaguitaranum. Hareftir komu ein trummusláari og føroyski bassisturin Mikael Blak á pallin, og góvu ljóðmyndini eitt skap, sum passar Teiti minst líka væl sum lítlu intimkonsertirnar við kertuljósum á pallinum. Og Teitur tyktist eisini at vera glaður fyri at hava ein bólk við sær. "Nu kan jeg endelig fá lov til at spille elguitar igen", segði føroyski altjóða sangarin og legði kassaguitaran frá sær. Næstu løtuna líktist hann meira tí livliga frontfigurinum í Mark No Limits enn friðarliga troubadurinum. El-guitarin mátti skjótt siga farvæl við ein strong, meðan Teitur bar áhoyrararnar ígjøgnum ein stóran part av løgunum á fløguni og eisini sang fleiri av hansara nýggju løgum, ið ljóðaðu sera trúgv mótvegis undanfarnu fløgu, og sum uttan iva vera at hoyra á næstu fløguni.

Longu nú er eitt av løgunum útgivið. lagið nevnist "Dreaming in Two Hour Drives" og kann keypast fyri ein dollara á heimasiðuni www.itunes.com

Fulla skrá

Konsertin á Voxhall var liður í einari konsertrøð í Europa, sum Teitur fór undir fyrr í mánaðinum. Í kvøld, leygarkvøld, spælir Teitur í Malmö, og mánakvøldið spælir hann í Vega í Keypmannahavn. Síðan gongur leiðin aftur til Svoríki, Noreg og til Holland, áðrenn Teitur vendir aftur til "heimamarknaðin" Norðuramerika. Í tíðarskeiðinum 16. til 24. apríl skal Teitur hita upp fyri Rufus Wainwright á ymsum spælistøðum í Kanada. Hareftir fer hann víðari við síni egnu konsertferð í USA allan mai mánað. Næstu ferð Teitur vendir aftur til Danmarkar verður í summar, tá hann er partur av skránni á ársins Roskilde Festivali.

Teitur treivst væl saman við lítla bólki sínum, sum umframt Mikael Blak, ið hómast á myndini, taldi ein trummusláara. Bólkurin var í Føroyum og vandi undan konsertrøðini í Skandinavia og Hollandi, ið heldur fram næstu tær vikurnar.
Mynd: Martin Dam Kristensen